


Grundøkið er umleið 570 fermetrar. Húsini eru í trimum hæddum. Miðhædd og kjallari eru umleið 84 fermetrar hvør, og ovasta hæddin er umleið 63 fermetrar.

Í miðhædd eru: Køkur, spísistova, stova, grovkøkur, spískamar, gangur, wc og eitt sovikamar.
Á loftinum eru: Trý kømur, baðiverilsi og loftsstova.
Í kjallaranum eru: Kjallararúm, hjallur, vaskirúm og fýrrúm, gangur og eitt stórt kamar.

Húsini eru frá 1970. Takið er nýtt (2007), klædningur og vindeygu eru skift á tveimum síðum. Restin er undir umvæling og verður liðugt í juni.

Bilhús á 35 fermetrar. Stór terassa er vestureftir og vakur urtagarður.

Boð undir 1,5 mió. kr. hava ongan áhuga.

**Tlf. 42 17 47 ella 26 38 89**
www.123hjemmeside.dk/siv_joensen

## Bingjur, hølir og smáttur til øll endamál til sølu









- Standard-bingjur, køl og fryst frá 6' til 40'
- Mannskapshølir / skrivstovur / matarhøllir
- Skúlastovur við vesi, bað o.a.
- Hølir til tjaldingarpláss við vesi, bað o.a.
- Sanitetsviðurskiftir til steðgipláss
- Summarhús, klár at seta upp
- Hølir til sergjørd endamál

**Nógv brúkt í Íslandi**

Vit hava bingjur/smáttur til sølu, sum kunnu setast saman, alt eftir tykkara tørvi.

**Ring til okkum og fá eitt tilboð!**

BILRØKT
Borgar fyri góðsku...

**Stiðjagøta 3 · FO-100 Tórshavn**
**tel: 588880 / 568888 · bilrokt@bilrokt.fo**
**www.bilrokt.fo**

# Móttøkufólk



## Starvsfólk til móttøkuna og skrivstovuna

**Í móttøkuni hjá Miðlahúsinum** er starv leyst, nú eitt av starvsfólkum okkara fer av landinum í útbúgvingarørindum. Vit rokna við, at tú byrjar í starvinum í seinasta lagi 1. august, men um møguligt síggja vit fegin, at tú byrjar fyri ta tíð.

Arbeiðstíðin er 30 tímar um vikuna, og fevnir starvið um kundamóttøku og –avgreiðslu av viðskiftafólkum hjá Rás2 og Sosialinum. Bæði umvegis telefon og í beinleiðis samskifti við tey mongu, sum hvønn dag støkka inn á gólv hjá okkum í Vágsbotni. Eisini fevnir starsvøkið um part av skrivstovuarbeiðinum hjá Rás2 og Sosialinum. Skrivstovuútbúgving er tí ein fyrimunur, men hetta verður ikki sett sum treyt.

Vit kunnu bjóða tær starv í eini spennandi fyritøku, sum hevur verið í stórari menning seinastu nógvu árini, og sum í dag er eitt veruligt miðlahús við framleiðslum og tænastum á fleiri miðlapallum.

Merki brævbjálvan »umsókn« og sendi hesa til:
*Sosialurin*
*Postsmoga 76*
*110 Tórshavn*

Áhugað kunnu eisini ringja til Jan Müller ella Regin I. Jakobsen á tlf 341800, ella senda teldupost til: jan@sosialurin.fo ella regin@sosialurin.fo

Seinasta freist at søkja starvið er 13. juni 2008.

Samtakið kring Miðlahúsið fevnir um Sosialin og Miðlavarpið, ið rekur Rás2.
Í samtakinum starvast í dag 42 fólk.

Sosialurin
Sosialurin · Postboks 76 · FO-110 Tórshavn

# FÖROYA KVÆÐI
## MENTANARKELDAN MIKLA



Í ár eru 40 ár liðin síðan Bókagarður byrjaði sítt virksemi. Hetta hátíðarhalda vit við at selja stóra kvæðaverkið **Føroya kvæði** við munandi avslættri og við lagaligum gjaldstreytum.

Verkið telur 37 bind, ið fevna um alt tað, sum áður útgivnu Føroya kvæði fevndu um. Harumframt eru nøkur nýggjari kvæði við, umfram frágreiðing um øll kvæðini, sum Dánjal Niclasen hevur skrivað. Kvæðabindini eru prentlistarligt dygdarverk, og hvørt bindið er innbundið í skreytkápu. Hendan útgávan fæst einans frá forlagnum.

Send bíleggingarlepan til: **Bókagarður, Postboks 369, 110 Tórshavn.**
Tú kanst eisini ringja tlf. 311110, ella senda teldupost til bokagardur@bokagardur.de

### BÍLEGGINGARLEPI

Undirritaða/i, sum við hesum skrivar seg fyri at keypa **Føroya kvæði**, ynskir at velja henda gjaldshátt fyri tey 37 bindini:

- ❑ at gjalda kontant kr. 4.995,00
- ❑ at gjalda kr. 499,50 um mánaðin í 12 mánaðir (5.994,00)
- ❑ at gjalda kr. 185,00 um mánaðin í 36 mánaðir (6.660,00)

(Set x við tann gjaldshátt, tú ynskir at nýta)

Teknar tú teg fyri *Føroya kvæði*, kanst tú velja tær tvær av bókunum niðanfyri (set tveir krossar):

- ❑ Frælsmannamál
- ❑ Læknabók I & II
- ❑ Førøsk Anthologi I & II
- ❑ Eitt orð í dag
- ❑ Bábilstornið og Glámlýsi
- ❑ Ferð mín til Jorsala á himni I&II

NAVN ....................

BÚSTAÐUR ....................

TELEFON .................... TELDUPOSTUR ....................